**Útboð - Keyp av tveimum bussum við lyft til í minsta lagið tveir koyristólsbrúkarar til Almannaverkið**

**Almannaverkið tørvar tveir nýggjar bussar til í minsta lagið tveir koyristólsbrúkarar**

Meginreglan er at allir bilar hjá landinum skulu verða el drivnir, og tað halda vit okkum til. Vísir tað seg, ikki at bera til at fáa ein nøktandi el drivnan, so hevur bensin/diesel áhuga. Almannaverkið biður tí veitarar um geva tilboð uppá el-, bensin og diesel buss.

**Treytirnar eru fylgjandi**

- Bussurin skal nýtast í samband við at fólk sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum skulu koyrast. Tað skal vera pláss fyri tveimum koyristólsbrúkarum.
- Bussurin skal veitast umbygdur við innvendigari lyft aftan, sum er egnaður til koyristólsbrúkarar
- Bussurin skal hava møguleika fyri at blíva umbygdur á verkstað, til at hava tvey einkult setur í rað aftan.
- Bussurin skal hava tvey einkult setur framman, t.v.s. ikki sofa
- Bussurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar
- Støddin á bussinum skal verða H2 og L2
- Bussurin skal hava bakkikamera og parkeringssensorar
- Levering: Bussurin skal leverast Almannaverkinum seinast í 2026
- Í fall av, at veitarar ikki kunnu geva nøktandi tilboð uppá el drivnan buss, ynskir Almannaverkið at fáa tilboð uppá akfør sum eru diesel ella bensin við automat gear
- Bussurin skal hava ein neutralan lit, sum t.d. koks- ella myrkagrátt. Svart ella hvítt kann eisini bjóðast, men kann verða mett lægri.
- Almannaverkið krevur, at veitarin skal hava góðkent verkstað tá tørvur er á eftirliti og umvæling.

**Tilboðið skal innihalda**

- Lýsing av bussinum.
- Tekniskt dátublað.
- Tilboðsgevari skal upplýsa fylgjandi:
    - Samlaðan prís uttan MVG.
    - Samlaðan prís við MVG.
    - Samlaðan prís við virðisgjald og MVG.
- Upplýsingar um garanti.
- Upplýsingar um serviceintervall.
- Væntaða veitingartíð.

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Um Almannaverkið í sambandi við hesa útbjóðing fær tørv á fleiri bilum av sama slag, tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar frá vinnandi veitara, uttan at nýtt útboð verður gjørt.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Almannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

**Tilboðini verða vektað soleiðis**

- Prísur 60 %
- Egnaður til endamál 20 %
- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu sendast til **rogi@av.fo**. Spurningar og svar verða kunngjørd á Keypsportalinum sum partur av útboðstilfarinum.

Tilboð skulu latast inn um til Almannaverkið í seinasta lagið mikudagin 23. September 2026 kl. 12:00.

Tilboðið skal sendast við telduposti til rogi@av.fo